## Et ikki eydnu-køkurnar

Danska matvørustýri mælir nú fólki frá at eta kinesiskar matvørur við mjólk í. Í ávaringini verða køkur, góðgæti, ordudrykkir og líkandi, sum kann inniheldur mjólk, nevnt. Ávaringin er íkomin eftir at fólk hava funnið melanin í kinesiskum matvørum við mjólk í. Melanin er skaðiligt evni, sum er funnið í kinesiskum matvørum og mjólkapulvuri í seinastuni. Nógv fólk eru vorðin sjúk, og pinkubørn hava eisini latið lív undir umfatandi melaningøluni.




# Borgarstjórar í Suðuroy vilja hava góða tíð til samanlegging

**Borgarstjórarnir í Suðuroy hava onki ímóti at viðgera spurningin um at leggja kommunurnar saman, men teir eru ikki samdir um, hvussu mannagongdin skal vera**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er í finasta lagi, at vit viðgera spurningin um at leggja kommunurnar í Suðuroy saman.

Tað halda borgarstjórarnir í Suðuroy.

Men hinvegin eru teir hvørki samdir um treytirnar fyri eini samanlegging ella um, hvussu skjótt hetta skal ganga fyri seg.

Spurningurin um at leggja kommunurnar í Suðuroy saman í eina kommunu, er aftur settur á dagsskrá eftir at kvinnufelagið, Valkyrjurnar, mikukvøldið skipaðu fyri almennum fundi um kommunusamanlegging.

Eitt høvuðsevnið á fundinum var eitt arbeiðsrit hjá granskingardeplinum fyri samfelagsgransking, har teir mæltu til eina skjóta tilgongd, har kommunustýrini long í næstu viku skuldu taka støðu til spurningin og er undirtøka fyri samanlegging, skuldi ein arbeiðsbólkur fara til verka beinanvegin.

Arbeiðsbólkurin skuldi vera liðugt longu í februar og fólkaatkvøða skuldi vera í mars. Tekur meirilutin undir við samanlegging, skuldi øll Suðuroy vera ein kommuna longu tann 1. januar í 2010.

Sosialurin hevur tosað við alla seks av teimum sjey borgarstjórunum í Suðuroy, men Elin Nielsen, borgarstjóri í Fámjin, kundi ikki gera viðmerkingar við so stuttum skotbrái.

Tann sjeyndi borgarstjórin, Kirstin Strøm Bech í Vági, vil hava alla oynna í eina kommunu, men ikki fyrrenn eftir valið, tí í hesum býráðnum er hon bundin av eini samtykt um, at verður samanlegging í Suðuroy, skal oyggin verða tvær kommunur

Allir hinir fimm borgarstjórarnir eru sinnaðir at taka spurningin upp og summir av teimum enntá fegnast um, at samanlegging aftur er komin á dagsskrá.

Men sum tað sæst í viðmerkingunum frá borgarstjórunum, halda teir ikki, at tað kann ganga so skjótt sum granskingardepilin hevur stungið út í kortið og tað eru eisini ymsar mannagongdir, teir eru ósamdir um.

# Samanlegging er neyvan ein fyrimunur fyri Hvalba

**Tað skal máti vera við, hvussu væl klaverið spælir, heldur Otto West, borgarstjóri í Hvalba**

SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Otto West, borgarstjóri í Hvalba, er púra avgjørdur um, at skulu kommunur í Suðuroy leggja saman, skal øll oyggin vera ein kommuna og hann hevur fatan av, at hetta eisini er støðan hjá bygdaráðnum. Kortini ivast hann í um samanlegging er nakar fyrimunur um Hvalba og hann kann undir ongum umstøðum taka undir við upplegginum frá granskingardeplinum um, at kommunurnar skulu ikki binda seg til fleiri íløgur hiðani og til samanleggingin er framd.

- Vit ganga undir ongum umstøðum undir við steðga øllum útbyggingum í Hvalba, sigur hann.

Otto West vísir á, at Hvalbiar Kommuna er væl fyri við einum 10 milliónum á bók og hann góðtekur als ikki, at hvalbingar bara skulu avlevera peningin í ein felags kommunukassa. Hann heldur, at kommunurnar eru alt ov ójavnt fyri fíggjarliga, tí


*Otto West, borgarstjóri í Hvalba*

Vágur og Tvøroyri skylda stórar upphæddir og tað holið skal ikki fyllast við tí, hvalbingar hava spart.

Harafturat hava hvalbingar longu verið við til at sanera skuld hjá Hvalba og Tvøroyri eina fer áður. Tað var í kreppuni í nítiárunum, at tær ringast staddu kommunurnar vórðu saneraðar fyri at koma upp undan aftur.

Tí verður tað eitt krav frá Otto West, at peningurin hjá Hvalbiar Kommunu, verður brúktur til útbyggingar í Hvalba. Tað kundi verðið brúkt til bátahylin, sum tey hava tosað um í bygdaráðnum, til at gera skúlan tipptopp ella til at fríðka um bygdina. Hinvegin ásannar hann, at peningurin skal ikki brúkast til íløgur, sum fara at føra áhaldandi rakstrarútreiðslur við sær.

Undir hesum fortreytunum, at kommunurnar leggja saman á fíggjarliga jøvnum føti, hevur hann onki ímóti at leggja kommunurnar saman

Annars dugir hann ikki at síggja, hví samanleggingin skal hava slíkan skund.

- Eru vit samd um at leggja saman, kunnu vit brúka eini tvey ár um at gera tað ordiligt og so at kommunurnar koma upp í felags kommununa á jøvnum føti, sigur hann.

- Sum støðan er nú, eru Vágur og Tvøroyri so illa fyri, at tað fara at ganga nógv ár, áðrenn hvalbingar fáa nakran sum helst ágóða av eini samanlegging, tí so kunnu vit gloyma alt um nakrar sum helst ábøtur og útbyggingar í bygdini tey næstu nógvu árini.

Annars ivast hann í, hvussu stórur fyrimunur tað er at leggja alla oynna saman, men eru fortreytirnar tær røttu, fer hann sjálvur í øllum førum ikki at seta seg ímóti eini samanlegging.

Lesi meira á síðu 13

